# Tvørkirkjuligt tiltak í Ítróttarhøllini í Runavík 2. jólakvøld



TÍÐINDASKRIV

Enn einaferð verður skipað fyri einum tvørkirkjuligum kvøldi í høllini í Runavík. Tað eru samkomurnar runt fjørðin, sum skipa fyri tí. Endamálið við tiltakinum er fyri tað fyrsta at skapa eitt høvi fyri trúgvandi at savnast um jólini at »feira« Jesus og at hitta onnur trúgvandi til felagsskap og uppbygging. Fyri tað næsta vilja fyrireikarar eisini verða við til at bjóða fólki, sum ikki vita hvar tey skulu fara 2. jólakvøld, ella ætla sær í »býin«, at koma í høllina at hoyra og síggja at gleðiboðskapurin so sanniliga ikki er turrur ella fyri øll »hini«, men at hann eisini er fyri tey.

Fyrireikararnir siga, at aldrin áður er meira neyðugt at venda um til Harran og velja hann. Hann kann geva tær tað mest spennandi lívið tú yvirhøvur kanst hugsa tær.

Skráin annars fyri kvøldið er, at tað er skipað í tveimum umførum. Í fyrru helvtini verður felagssangur, dansibólkur, vitnisburður og lovsangur.

Hin seinna helvtin verður meira við luttøku av ymsum gospelbólkum, m.a. Saltbrøður, dansibólkur v.m. Til endans verður lovsangur áðrenn Jeffri Johannesen tekur samanum.

Umleið kl. 22.00 verður kaffi/te, har fólk kunnu hitta vinir og kenningar og nýta høvið at práta saman. Kaffi er ókeypis.

Sum sagt eru øll hjartaliga vælkomin, stór sum smá. Kvøldið byrjar kl. 20.00.

Fyrireikararnir eru Keldan, Missiónshúsið Glyvrar, Ørkin, Lívsins Orð og Berøa.

# MBA í Aberdeen

Nú oljuvinnan pikkar upp á dyrnar, og sera gott flogsamband er til Aberdeen, er lagamanni hjá føroyingum at fáa sær útbúgving í hesum høvuðsstaði oljuvinnunar í Europa.

Tvey universitet eru í Aberdeen - Aberdeen University og Robert Gordon University.

Einir 10 føroyingar lesa í løtuni á hesum báðum universitetum í Aberdeen.

Ein útbúgving, sum alt fleiri føroyingar eru farnir undir, er MBA (Master of Business Administration). Hetta er ein sera væl umtókt altjóða útbúgving, sum gevur breiðan førleika innan leiðslu. Einir 6-8 føroyingar hava tikið hesa útbúgving ymsa staðir úti í heimi - teir flestu í Bretlandi. MBA lesnaður tekur vanliga 1,5 - 2 ár, um lisið verður fulla tíð, tvs. dag undirvísing, og umleið 3-5 ár um lisið verður parttíð, tvs. við kvøld og vikuskiftis undirvísing. Neyðugt er at hava hóskandi útbúgving og arbeiðsroyndir áðrenn MBA lesnaður kann byrja.




*Bjarti Thomsen, Argir (høgrumegin), sum júst hevur lokið MBA prógv í Aberdeen og Hans Jákup Mikkelsen, úr Gøtu (vinstrumegin), sum byrjaði MBA lestur í september í ár*

MBA útbúgving fæst eisini í Aberdeen - á Aberdeen Business School, sum er partur av Robert Gordon University. Í millum prógvini frá Robert Gordon University í ár, sum vórðu handað á hæbarsligari samkomu tann 6. december, var eisini eitt MBA prógv handa einum føroyingi. Tað er Bjarti Thomsen, Argir, sum júst hevur lokið MBA prógv. Og í september í ár byrjaði ein annar føroyingur, Hans Jákup Mikkelsen, úr Gøtu, sama lestur á Aberdeen Business School.

Á Aberdeen Business School, eru umleið 15-20 sum hvørt ár lesa MBA fulla tíð og eini 40-50 sum lesa MBA parttíð. Tey sum lesa MBA parttíð á Aberdeen Business School eru oftast bretar sum hava fast arbeiði (oftast í oljuvinnuni), meðan tey sum lesa fulla tíð eru sum oftasst útlendingar. Í flokkinum, sum Bjarti gekk í, vóru t.d. 19 næmingar, umboðandi 14 ymisk lond í Asia, Afrika, Suðuramerika og Europa. Hetta gevur eitt sera ríkandi og spennandi altjóða umhvørvi.

At lesa MBA kostar ikki einki. Ein MBA útbúgving á Aberdeen Business School kostar í løtuni 11.000 £ (130.000 kr) og harafturat kemur livikostnaður í Aberdeen. Føroyski studulsstovnurin letur stuðul til tílíkt skúlagjald og danskur útbúgvingarstuðul (SU) fæst sum ískoyti til livikostnað. Livikostnaðurin (íbúð, føði, klæði vm.) í Aberdeen er nakað tað sama sum í Føroyum.




